# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroyanevnd stovnað í Westminster

Herfyri frættust tey góðu tíðindi, at ein Føroyanevnd er sett á stovn í bretska parliamentinum, Westminster. Talan er um eina sokallaða "all-party parliamentary group". Limirnir í nevndini eru bretskir tinglimir, sum øll onkursvegna hava ein serligan áhuga fyri Føroyum. Nevndin hevur um 20 tinglimir, sum umboða ymsu økini í Bretlandi og er partapolitiskt óheft.

Føroyska sendisstovan í London segði í tíðindaskrivi, at yvirskipaða endamálið er at fremja sínámillum kunning og samstarv. Ætlanin er, at nevndin skal arbeiða við felags áhugamálum sum til dømis fiskivinnufyrisiting, orku, ferðavinnu og umhvørvisbroytingum. Nevndarlimirnir kunnu eisini føra fram føroysk sjónarmið í House of Commons. Nevndin vil fegin hitta ráðharrar og politikarar úr Føroyum, tá tey vitja í Bretlandi, og hon fer væntandi eisini at samskifta við Uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum. Seinni vónar nevndin eisini at fáa høvi at koma á vitjan í Føroyum verður sagt í kunningini.

Sigmundur Ísfeld, sendimaður í London, frøist um, at góða sambandið, sum leingi hevur verið millum Føroyar og Bretland, nú er styrkt og komið í eina meira skipaða legu í bretska politiska kervinum.

Formaður í nevndini er Alistair Carmichael tingmaður fyri Hetland og Orknoyggjarnar. Varaformaður er Lord Faulkner of Worcester limur í House of Lords. Kassameistari er Sir Nicolas Winterton tingmaður og skrivari er Angus MacNeil tingmaður fyri Suðuroyggjarnar.

Vit kunnu ikki annað enn ynskja sendistovu okkara og annars uttanríkistænastuni her á landi tillukku og góða eydnu við hesum frálíka tiltaki. Hetta er týðandi liður í royndum okkara at gerast meira sjónlig sum serstøk tjóð og fólk í umheiminum, at byggja brýr millum londini bæði og annars at menna samstarvið á øllum økjum – við henda risastóra granna okkara.

Eingin ivi er um, at vit eitt nú á orku- og kolvetnisøkinum kunnu fáa stórt gagn av størri samskifti og samstarvi við Stórabretland. Her hugsa vit ikki minst um royndirnar at menna tann stóra og enn lítið útbygda oljulandslutin millum Hetland og Føroyar.

Áhugavert er annars at blaða í Sosialinum frá 90-árunum, tá Louis Wilson, pionerur og undangongumaður í stríðnum fyri føroyskum áhugamálum í Bretland vísti á nettup týdningin ein slík Føroyanevnd kundi hava. Nú er hon so veruleiki og vit ynskja henni góðan byrð.

**Sosialurin**

## Nærverkið - starvsfólkaorka og hugburður

TURIÐ JACOBSEN

Tað var við stórum áhuga, at eg las frágreiðingina frá Løgtingsing Umboðsmanni (LUM) um, at nógv av viðurskiftunum, sum hon fanst at á sambýlinum á Bóndaheygi 14, nú eru við at koma í rættlag. Tað vakti eisini mín áhuga at lesa frágreiðingina frá Nærverkinum til LUM, har tað m.a. stendur "... trupulleikin við væntandi arbeiðsorku, havandi í huga metlága arbeiðsloysið, ið fevnir um øll starvsøki í landinum. Hetta er eisini ein trupulleiki, sum Nærverkið merkir avleiðingarnar av."

Eg havi sum avvarðandi at einum búfólki á Mýruni 4 - 6 seinasta árið verið vitni til og partvíst partur av stríði millum starvsfólkini øðrumegin og fyrrverandi leiðsluna á sambýlinum og Nærverkið hinumegin. Avleiðingin av stríðinum var, at tey starvsfólkini, sum høvdu arbeitt longst á sambýlinum, søgdu seg úr starvi. Talan var um starvsfólk, sum við sínum fakligu og menniskjaligu eginleikum vóru sera væl skikkaði til bæði at vera um búfólkini á sambýlinum og at samskifta við okkum avvarðandi. Fleiri teirra høvdu arbeitt á sambýlinum í fleiri ár, tey kendu og kundu tulka okkara menningartarnaðu, bæði hvussu tey virkaðu sum einstaklingar og í bólki og høvdu eitt sera gott samskifti við okkum avvarðandi.

Tað týdningarmesta tilfeingið innan hesa skipanina er júst starvsfólkið, og hesi vóru snøgt sagt júst tað slagið av starvsfólki, sum okkara menningartarnaðu og skipanin, sum varðar av teimum, hava tørv á. Hesi starvsfólkini høvdu megnað at skapa tryggar og mennandi karmar fyri búfólkini, hóast tað vísti seg, at tey ígjøgnum longri tíð høvdu virkað undir út av lagi vánaligari leiðslu.

Mann skuldi trúð, at Nærverkið, sum hevur ábyrgdina av viðurskiftunum hjá menningartarnaðum, sá tað sum sína uppgávu at handla út frá tørvinum hjá teimum við menningartarni og júst virðismetti hesar eginleikarnar hjá starvsfólkunum. Men nei, tvørturímóti, til síðst føldu starvsfólkini seg so kroyst av Nærverkinum, at tey valdu at siga seg úr starvi, hóast tey øll ynsktu at halda fram á sambýlinum.

Bæði áðrenn og aftan á uppsagnirnar bar Nærverkið seg at, sum um tey ikki ynsktu hesi starvsfólkini. Tí loypur tað mær í eyguni at lesa, at Nærverkið sigur seg merkja trupulleikarnar av væntandi arbeiðsorku.

## Kreativ fíggjarlóg fyri 2008 er staðfest

KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin



Enn einaferð er staðfest, at fíggjarlógin fyri 2008 byggir á kreativt bókhald.

Enn eitt fíggjarnevndarskjal er viðgjørt í fíggjarnevndini. Hesa ferð var talan um at játta 5 mió. krónur til Sernámsdepilin. Frammanundan eru knappar 10 mió. krónur játtaðar til Smyril, og Landssjúkrahúsið manglar 30 mió. krónur. So fíggjarlógin sum bleiv samtykt á miðjari nátt fyri góðum mánaði síðani skal longu hava einar 45 mió. krónur afturat á útreiðslusíðuna. Tá tað er komið afturat, er avlopið vent til hall.

Tað løgna við hesum meirútreiðslunum er, at tær allar vóru kendar áðrenn fíggjarlógin var endaliga samtykt. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum visti, at Landssjúkrahúsið mátti hava fleiri pengar, landsstýriskvinnan í samferðslumálum visti, at Smyril skuldi í dokk og Mentamálaráðið var kunnað um, at Sernámsdepilin hevði tørv á hægri játtan enn tað, sum stóð á fíggjarlógini. Men kortini varð fíggjarlógin samtykt uttan nevndu játtanir.

Tað ljóðaði annars, at tamarhald skuldi fáast á útreiðslunum og at "klokkuklárar mannagongdir" skuldu eyðkenna arbeiðið hjá samgonguni, men higartil hevur lítið verið at sæð til tað. Avlopið sum skuldi verða skrivað við trýsifraðum tølum er burtur, og tvey fíggjarnevndarskjøl eru longu skrivað tann fyrsta mánaðin síðani fíggjarlógin kom í gildi.

Sjálvandi skulu stabilisatorarnir á Smyrli fáast at virka áðrenn veturin kemur og sjálvandi eiga børn við serligum tørvi at fáa ta hjálp, sum tey hava brúk fyri. Tað er ikki tað, ið funnist verður at. Men átalast má, at landsstýrið onga fíggjarstýring hevur og at ein kreativ fíggjarlóg er samtykt, sum ikki vísir, hvørjar frammanundan kenda útreiðslur landsstýrið ætlar at hava í fíggjarárinum.

Føroyar hava brúk fyri eini arbeiðsførari samgongu, sum megnar at halda skil á stýringini av samfelagnum. Men eina slíka samgongu hava vit ikki í løtuni.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.